


Almannastovan

# Sosialráðgevi

Eitt starv sum avloysari fyri sosialráðgeva við tænastu á Økisdeildini í Eysturoy er leyst at seta í tíðarskeiðnum 01/03-2003 til 31/08-2003.

**Arbeiðsuppgávur:**

- Ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- Seta í verk fyriskipanir sambært forsorgarlógini og almannapensiónslógini
- Ráðgeva barnaverndarnevndum
- Seta í verk fyriskipanir sambært barnaforsorgarlógini í samstarvi við barnaverndarnevndirnar
- Gera tilráðingar í samband við umsóknir um fyritíðarpensiónir
- Annað

**Útbúgvingarkrøv og royndir**

- Sosialráðgevaraútbúgving
- Royndir innan almenna fyrisiting
- Góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- Góður málburður í føroyskum, bæði munnliga og skrivliga

**Um deildina**

Arbeiðsøkið hjá økisdeildini er ráðgeving og vegleiðing í persónligum og forsorgarligum spurningum, støðutakan til og fyriskipan og avgreiðsla av veitingum og tiltøkum sambært forsorgar-, almannapensións- og barnaforsorgarlógini. Á deildini, sum er í Runavík, starvast 7 fólk.

**Lønar- og setanarviðurskifti**

Setanar- og lønarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið í bólki 5.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Økisdeildina á tlf. 44 82 60.

**Umsókn**

Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skulu sendast til
Almannastovuna
Postmoga 3096
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 1. mars 2003**

Vinarliga merkið brævbjálvan: »Sosialráðgevi Eysturoy«



Føroya Koyriskúli

Nýtt skeið byrjar mánadagin 17. februar kl. 19.00

Føroya Koyriskúli
v/Jákup Andreas Mohr
Suðuroyarvegur 11
FO-100 Tórshavn
**Tlf. 31 33 00 • Fartlf. 21 10 10**

# Ársaðalfundur

Ársaðalfundurin hjá Felagnum Tórshavn verður sunnudagin 2. mars 2003 kl. 15.00 á Hotel Tórshavnar Sjómansheimi.

Uppskot til mál, ið ynskjast viðgjørd á aðalfundinum, skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi mikudagin 19. februar 2003.

Dagsskrá fyri ársaðalfundin verður send limum felagsins í brævi sambært viðtøkum felagsins.

**Nevndin**

# Handilshøli til leigu

Handilshøli á Stangavegi 92 í Klaksvík til leigu. Hølini, talan er um, eru har norðoya deildin hjá Norðoya Sparikassa fyrr húsaðist. Hølini eru í góðum standi og eru eisini vælegnað til skrivella teknistovu.

Áhugað kunnu ringja 457128



# Almannastovan

# Stuðulsfólk

Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki. Sum stuðul fært tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
Fylgjarauppgávur Stimbran Familjuráðgeving Umlætting

**Størvini eru hesi:**
**Norðurstreymoy**

1) – at vera fylgjara til skúlabarn.
Arbeiðið fevnir um at koyra barnið til og frá skúla, neyðugt er at umsøkjarin hevur bil. Tímatalið er 3 tímar um dagin.

**Tórshavn**

2) – umlættingarfamilju til 4 ára gamla gentu, ávíkavist 3 og 5 nætur um vikuna. Arbeiðið fevnir um at umlætta familjuna og í fyrstu atløgu verður arbeiðið gjørt heima hjá umlættingarfamiljuni. Ynskiligt er at umsøkjari hevur kunnleika til børn við serligum tørvi.

Setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Ragnhild Dahl á tlf. nr. 35 35 10, gerandisdagar millum klokkan 09.00 og 13.00, tó ikki mikudag.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu verða

Almannastovuni,
J. Broncksgøta 27,
Postboks 3096,
110 Tórshavn,

í hendi í seinasta lagi 01.03.2003.

**Í umsóknini skal vera tilskilað uppgávunummar.**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr**. Sp/f 1460, Sp/f Høgni Jøkladal, 530 Fuglafjørður.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Margit Oline Jøkladal, 530 Fuglafjørður (formaður), Karl Olivar Jøkladal, 530 Fuglafjørður og Høgni Jørleif Jøkladal, 530 Fuglafjørður.
**Innkomin í nevndina:** Bergur Poulsen, Nýggivegur, 620 Runavík (formaður), Pól Huus Sólstein, 513 Syðrugøta og Jústinus L. Justinussen, 480 Skáli.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Høgni Jørleif Jøkladal, 530 Fuglafjørður.
**Innkomin sum stjóri:** Pól Huus Sólstein, 513 Syðrugøta.

*Skráseting Føroya tann 13. februar 2003*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr**. P/F 1814, P/F Føroya Møblasøla, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 14.01.2003.
**Nýtt hjánavn:** P/F Ide (P/F Føroya Møblasøla)

*Skráseting Føroya tann 13. februar 2003*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 2276, P/F Meinhard Arge, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 06.01.2003.
**Nýggj hjánøvn:** P/F Bilarge.fo (P/F Meinhard Arge) og P/F Bilarge (P/F Meinhard Arge)

*Skráseting Føroya tann 13. februar 2003*

*Kristin Balle*

Lesið internet Sosialin !

www.sosialurin.fo

JARÐFRØÐISAVNIÐ
Faroese Geological Survey

# Jarðfrøðingur/ jarðalisfrøðingur

## - avloysarastarv á Jarðfrøðisavninum

*Jarðfrøðisavnið er vísindaligur kanningarstovnur undir Oljumálastýrinum og virkar í kolvetnisumsitingini somuleiðis sum samskipaður partur av stýrinum við ábyrgd fyri øllum jarðfrøðiligum viðurskiftum.*

Lýst verður eftir avloysara fyri jarðfrøðing í barnsburðarfarloyvi í 7 mánaðar (kann gerast longri) at byrja skjótast til ber.

**Starvið**
Setanin er á kanningardeildini á Jarðfrøðisavninum. Her skal avloysarin hjálpa til við teimum dagligu uppgávunum, sum eru fjøltáttaðar og ofta verða loystar í tvørfakligum arbeiðsbólkum innan og tvørturum deildarmark. Ein av seruppgávunum, ið avloysarin skal hjálpa til við, er at byggja upp ein dátugrunn við upplýsingum um fysisku, kemisku og bygnaðarligu eginleikunum í basaltinum, sum kunnu hava týdning fyri oljuleitingina kring Føroyar. Aðrar uppgávur fevna eitt nú um tulking av seismiskum og petrofysiskum kanningartilfari frá oljuleitingunum.

**Krøv til umsøkjaran**
Setanin krevur eina geovísindaliga útbúgving á universitetsstøði. Fyrimun hava umsøkjarar við royndum innan nýtslu av teldutøkni í sambandi við loysn av jarðfrøðiligum spurningum, og við góðum samstarvsevnum og fakligum smidleika.

**Setanarviðurskifti**
Vit bjóða eitt spennandi, avbjóðandi og sjálvstøðugt starv í einum lítlum, men fjøltáttaðum fakumhvørvi við tøttum tilknýti til oljuleitingarvirksemið óðrumegin, og til føroysku oljumyndugleikarnar hinumegin.

Lønin er sambært sáttmála millum avvarðandi fakfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn**
Umsóknir við hjáløgdum CV, avriti av embætisprógvi, frágreiðing um arbeiðsroyndir v.m., skulu vera Jarðfrøðisavninum í hendi í seinasta lagi 1. mars 2003. Adressan er:

**Jarðfrøðisavnið**
postmoga 3169, 110 Torshavn

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til: Martin V. Heinesen, stjóra, tel. + 298 357002, t-bræv martinh@jfs.fo, ella Claus Andersen, deildarstjóra, tel. + 298 357009, t-bræv claus@jfs.fo.

---

*Jarðfrøðisavnið hevur til endamáls at savna, varðveita, handfara og breiða út kunnleika um viðurskifti av týdningi fyri gagnnýtslu og varðveitslu av landsins jarðfrøðiligu náttúruvirðum. Stovnurin skal virka fyri, at lóggáva og umsiting av jarðfrøðiligum náttúruvirðum verður grundað á framkomna og dagførda jarðfrøðiliga vitan.*

# Ársaðalfundur 2003

Boðað verður til ársaðalfundar á Parnassinum á Hotel Hafnia hósdagin 27. febr. 2003, kl. 19.30.

Fundarskrá verður eftir §17 í felagsins lógum.

**Havnar Handverksmeistarafelag**

# Aðalfundur

Aðalfundurin hjá Klaksvíkar Útróðrarfelag verður í Klaksvíkar Sjómansheimi 20. februar kl. 10.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

# Sølu- og avgreiðslufólk

Starvsfólk søkist til fjølbroytt arbeiði, ið umfatar sølu, kundarøkt og avgreiðslu.

Umsøkjarin skal vera fyrikomandi, hava teldukunnleika á brúkarastøði, og somuleiðis verða handaligur.

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 01.03.03.

Starvssetan skjótast til ber.

**INVENTAR TÆNASTAN**

Heygsvegur 23
Postmoga 1002
FO-110 Tórshavn

Tlf. +298 35 38 00
Fax + 298 35 38 01
inventar@inventar.fo
www.inventar.fo